## Hugskot til hvat tit kunnu gera, tá tit hittast

- Venja føroyska málið t.d. gera skúlating.
- Hyggja ella lurta eftir føroyskum sendingum.
- Lesa bløð og bøkur saman.
- Ganga túrar og tosa um nærumhvørvið.
- Tosa um okkara ymisku mentanir og siðvenjur.
- Fara til ymisk frítíðarítriv ella tiltøk.
- Tosa um gerandisavbjóðingar og hendingar.
- Gera mat og eta saman.
- Gera bindiklubbar ella ítrivsklubbar.
- Fara túrar og útferðir, til dømis á søvn, til søgulig støð, runt í býnum ella til handils.
- Drekka ein kaffimunn og práta.

**Hevur tú áhuga fyri at gerast familjuvinur hjá einari tilfluttari familju, les meir á og skrásett teg á:**
www.redcross.fo/familjuvinir

REYÐI KROSSUR


**Reyði Krossur Føroya**
Stiðjagøta 6
100 Tórshavn

Tel: 283630

redcross@redcross.fo

www.redcross.fo


# FAMILJUVINIR

Hevur tú hug at gerast sjálvboðin familjuvinir hjá tilfluttum familjum ella einstaklingum?



Hevur tú hug at hjálpa tilfluttum familjum ella einstaklingum at gerast partur av føroyska samfelagnum? So kanst tú fáa samband við eina familju ella einstakling gjøgnum netverkið hjá Reyða Krossi.

## Tilflutti vinurin

Nógv fólk flyta til Føroyar og orsakirnar fyri at koma higar eru ymiskir. Men felags fyri tilflytarararnar er, at tey ofta flyta frá øllum tí kenda til eitt heldur ókent land, við fremmandum máli og mentan, og at tað kann vera trupult at gerast ein partur av samfelagnum og skapa nýggj vinabond.

Reyði Krossur ynskir at vera viðvirkandi til at tilfluttar familjur ella einstaklingar fáa møguleika at verða partur av einum felagsskapi.

Reyði Krossur fer tí undir átak at veita tilfluttum útlendskum familjum, ella einstaklingum, ein møguleika at koma í samband við føroyskar familjur.

Royndir vísa, at tilflytarar skjótari fella til og føla seg meira vælkomnan í nýggja heimlandinum, um tey megna at fáa samband við heimafólki.

Tey læra mál og mentan skjótari, støðast og trívast betur, um tey megna at skapa sær eitt netverk.



## Familjuvinurin

Hava tú og/ella familjan hjá tær hug at gera mun fyri eina tilflutta familju ella ein tilflytara, sum ikki hevur eitt stórt føroyskt netverk? So ber til at gerast familjuvinur gjøgnum Reyða Kross.

At vera familjuvinur er sjálvboðið og ólønt arbeiði. Sum familjuvinir skulu tit vera álítandi, vinalig og virða menniskju, sum tey eru.

Ein sjálvboðin familjuvinur frá Reyða Krossi er ein, ið hevur hug at knýta vinarbond og er áhugaður í at hjálpa tilflytarum at fella til. Saman kunnu tit eitt nú menna og venja føroyska máli og tosað um føroysk viðurskifti. Um tit ganga túrar, ber til at siga frá um t.d. nærumhvørvið og staðarnøvn.

Sum nýggjur sjálvboðin fært tú innleiðslu og vegleiðing frá Reyða Krossi.

Ætlanin er, at tit hittast hvørja ella aðruhvørja viku, eftir avtalu. Tit kunnu hittast heima hjá hvørjum øðrum, úti ella til okkurt felags áhugamál. Tað avtala tit sjálvi tykkara millum.

Ongin familja er líka og tí sóknast vit eftir ymsum familjum og einstaklingum, sum kundu hugsað sær at gjørt mun fyri eina tilflutta familju ella einstakling

Vit vilja royna at finna ein vin ella familju, sum hóskar til tín tørv og áhugamál.

